# Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit øllum, ið gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 12. november. Gleðilig jól og gott nýggjár.*
***Sølva og Jóhan Vest***



*Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara tann 18. juni. Eisini ynskja vit øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.*
***Ynskja Sigrið, Jón Edvard og børnini***



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 2. juli 2005. Takk fyri ein góðan og ógloymandi dag. Eisini vilja vit nýta høvi at ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.*
***Sunfrið og Aleksandur***



*Hjartaliga tøkk fyri heilsanirnar vit fingu á silvurbrúðleypsdegi okkara 25. okt. 2005. Tað gleddi okkum stórliga. Góð jól og Harrans signing í komandi ári.*
***Heilsan Jóna og Poul Jespersen, Hvalba***

*Innastu tøkk til tykkum, sum gleddu okkum á krúndiamantbrúðleypsdegnum 5. des. 2005. Tøkk til tykkum, ið komu á Sjómansheimið, sendu telegramm og komu við gávum. Serliga takk til børn og svigarbørn. Somuleiðis ynskja vit øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár við tøkk fyri skjótt farna árið*
*Heilsan Signa og Søren Jacob Lamhauge, Rituvík*






*Hjartaliga takka vit øllum, sum gjørdu okkum gullbrúðleypsdagin tann 22. okt. so minnisríkan. Takk fyri vitjan, gávur, blómur, fjarrit og uppringingar. Eisini ein tøkk til tykkum, sum vaktu okkum við sangi og tykkum, sum stákaðust. Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og Guds signing í tí nýggja árinum.*
***Blíðar heilsur***
***Súsanna og Meinhardt Jacobsen, Argir***